# LAR EINKI ...



**SKRÚVA**

*Fyrr sluppu lærlingar ikki framat at skrúva beinanvegin. Í dag er nógv broytt. Werner Hentze er her farin undir at skifta koplingina út á einum bili. – Hetta er í finasta slag, sigur hann*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Soleiðis var vist eisini í lívinum hjá tí unga manninum úr Saltangará, og sum í dag er farin at læra til bilmekanikara hjá Reyni Service í Klaksvík, undir góðari leiðslu av Hans Berg Hammer og hansara monnum.

Sigast skal tó, at Werner ikki var púrasta ókendur við umvæling av bilum, og heldur ikki við bilsøluna og verkstaðið í Klingrugarði, nú lærutíðin byrjaði.

– Eg gekk á bildeildini hjá SIT í Havn. Tá vit so í vár skuldu út í praktikk, søkti eg fyrst at fáa eitt praktikk-pláss hjá einum í Runavík. Tað hevði verið nakað lættari, tá eg jú búgvi harúti.

– Men har var eg ov seinur, tí onkur annar hevði søkt har frammanundan. Eg royndi so at søkja her hjá Reyni Service í Klaksvík. Og her slapp eg inn beinanvegin, greiðir hann frá.

## » Mær hevur altíð dámað væl at skrúva

### Lærdi meiri her

Hóast henda praktikkin einans vardi í tvær vikur, var líkt til, at hann fekk nógv burtur úr á verkstaðnum, har alskyns bilar verða umvældir, hóast teir í fyrstu syftu er umboð fyri Toyota-bilar.

Hesar báðar vikurnar kveikti óivað hug hansara at halda fram í hesi bransjuni.

– Ja, eg lærdi faktist meiri her á verkstaðnum, enn í skúlanum, slær Werner fast.

Hann spurdi seg fyri hjá leiðaranum á verkstaðnum, Hans Berg um møguleikan fyri at fáa eitt lærupláss. Og mín sann um tað ikki eydnaðist honum.

– Eg byrjaði í læru fyri einum mánaði síðani.

Vanliga er lærutíðin fýra ár, men av tí at Werner hevur SIT-prógv, fær hann góðskrivað eitt hálvt ár av lærutíðini.

### Skrúva

Áður var sagt, at teir sum byrjaðu at læra til bilmekanikara ikki sluppu at gera stórvegis annað enn at vaska bilar og sópa gólv.

At tað er nógv broytt í dag, kann Werner uttan iva skriva undir uppá. Síðani hann byrjaði, hevur hann luttikið í ymiskum virksemi á verkstaðnum.

Hann hevur skift dekk og olju á bilum og annað.

– Og jú, eg eri eisini sloppin at skrúva eitt sindur uppá onkran bil, greiðir hann frá.

Hinir sveinarnir eru altíð til staðar, og kunnu veita honum góð ráð, – um og tá tað gerst neyðugt.

– Eg haldi, at vit hava tað bara fínt saman.

snorri@sosialurin.fo

Skaðasýn

Í dag, 6. oktober, hevur eitt sonevnt tryggingarsýn verið her á deildini hjá Toyota. Bilar, sum skuldu sýnast, skuldu møta í seinasta lagi kl. 9 í morgun, og kundu so heintast aftur kl. 15. Sagt verður, at ein her kann umvæla øll bilmerkir á tí vælútgjørda verkstaðnum, sum er útgjørt við nýggjastu útgerðini.
Her kann ein eisini sýna og umvæla tryggingarskaðar hjá TRYGD og Tryggingarfelagnum Føroyar. Privatskaðar verða eisini gjørdir, eins og ein kann fáa eitt óbindandi tilboð uppá ein bilskaða.